JÓANSØKURÓÐURIN:

# Sangurin úr høvuðsstaðnum er tagnaður

**KAPPRÓÐUR Tá ið sæð verður burtur frá øðrum av barnaróðrunum, so eydnaðist tað ikki nøkrum báti úr høvuðsstaðnum at vera fyrstur á mál í kappróðrinum á Jóansøku**

Tróndur Arge

Høvuðsstaðurin eigur trý av størstu róðrarfeløgunum í landinum, og uttan undantak, so hevur tað undanfarnu árini verið soleiðis, at feløgini í høvuðsstaðnum hava vunnið nógvar róðrar. Ofta annan hvønn og meiri enn tað.

Burtursæð frá í øðrum av barnaróðrunum so vunnu bátar úr høvuðsstaðnum ongan róður. Kringvarpið plagar at spæla nógvar sangir til heiður og æru fyri bátar hjá Havnar Róðrarfelag, Róðrarfelagnum Knørri og Argja Róðrarfelag, sum plaga at vinna, men tá ið tað ræður um at vinna, so var øskukalt hjá hesum trimum feløgunum, tá ið tað leygardagin varð kappast á Vágsfirði.

Í trimum kappingum vóru bátar úr høvuðsstaðnum nummar tvey: Blikur hjá Argja Róðrarfelag í kappingini millum dreingirnar, Argjabáturin í kappingini millum 8-mannaførini og Sílið hjá Havnar Róðrarfelag í kappingini millum 5-mannaførini við gentum. Eingin bátur hjá Knørrafelagnum taldist millum teirra sum í kappingini millum tey vaksnu vann heiðursmerkir.

At bátarnir úr høvuðsstaðnum halda seg aftur í ár ber við sær, at aðrir halda seg framat. Tað man vera sjáldan, at vinnararnir hava verið so javnt býttir kring landið, sum teir vóru tað á Jóansøku. Klaksvíkingar vunnu ein sigur, fuglfirðingar vunnu ein sigur, tey á Skálafjørðinum vunnu tveir sigrar, kvívíkingar vunnu ein sigur, og vertirnir úr Vági vunnu ein sigur.

Eisini millum teir næstfremstu var umboðanin fjølháttað. Vestmenningar vóru næstbestir í einari kapping, Argir var næstbest í tveimum kappingum, Tvøroyri var næstbest í tveimum kappingum, Havnar Róðrarfelag var næstbest í einari kapping, og Hvalvík-Streymnes vóru næstbest í einari kapping.

Nýggja kappróðrarmálið í Vági stóð royndina. Tað var harmuligt, at ein tími skuldi fara, áðrenn tað eydnaðist at senda fyrstu bátarnar avstað, men so hefti ikki fyri.

Leygardagin verður aftur kappróður. Tá verður kappast á Fjarðastevnu, sum hesa ferð verður í Vestmanna. Har verður bara kappast á 1000 metra málinum, og tí eru fyritreytirnar góðar fyri, at tað fer at verða eins spennandi og intenst, sum tað var í Vági síðsta leygardag.

Og so fæst at síggja, um tað tá fer at verða orsøk at heiðra vinnarar hjá teimum trimum feløgunum í høvuðsstaðnum, ella um tað aftur fara at vera bátarnir av bygd, sum fara at vinna.



*Serliga Vestmenningur var tætt við, men aftur hesaferð var Eysturoyingur bestur*

# Stórt drama og sama úrslit

**10-MANNAFØR Hóast bæði Vestmenningur og Hoyvíkingur høvdu hug at bjóða av og vóru tætt við, so var tað enn eina ferð Eysturoyingur, sum var bestur í tøttu kappingini**

Tróndur Arge

Talan var um stórt drama, tá ið 10-mannaførini í framúr tættari kapping settu punktum fyri fjórðu FM kappingini í ár.

Tað man vera sjáldan, at allir bátarnir í einum og sama kappróðri royna at vera á odda. Gamaní eru tað bara trý 10-mannafør, tíverri, sum luttaka í kappingini í ár. Men kortini. Vestmenningur og Eysturoyingur skiftust um at liggja á odda, tá ið teir ikki lógu stavn um stavn á stutta teininum á Vágsfirði, og tá ið endaspurturin nærkaðist, hevði Hoyvíkingur hug at blanda seg uppí, og kanska var hann fremstur, áðrenn hinir báðir svaraðu aftur.

Og so endaði tað, sum tað nú hevur gjørt í trimum av fýra kappingum í ár. Eysturoyingur fór fyrstur um málið. Men tað leyp ikki nógv av. Bara skutin aftanfyri vóru vestmenningar, sum í startinum høvdu verið so mikið væl við, at tað kanska kundi roknast við, at Vestmenningur fór at endurtaka sigurin, sum hann vann í Sundalagnum.

Hoyvíkingur var bara eina bátslongd aftanfyri vinnarabátin, og tað kundi boðað frá, at møguleikin fyri, at Hoyvíkingur kann fara at gera um seg – eitt nú á Ólavsøku – skal ikki avskrivast!

Á Vágsfirði vann Eysturoyingur í 2006. Ta ferðina var tað í tættari kapping við Klaksvíking, og ta ferðina var Vestmenningur nummar trý. Í 2004 gjørdu hvørki Vestmenningur ella Eysturoyingur nakað serligt um seg, tí teir endaðu á ávikavíst 5. og 4. plássi. Í 2002 vóru tað júst hesir báðir bátarnir, sum kappaðust um sigurin. Tá var tað Vestmenningur, sum vann. Í 1998 vann Eysturoyingur, og Vestmenningur var næstfremstur, og hesa ferð var tað so aftur Eysturoyingur, sum átti tørn, og tí kann ikki annað sigast, enn at Eysturoyingur er favorittur at vinna FM heitið.

**ÚRSLIT**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Eysturoyingur | 04:25.05 |
| 2 | Vestmenningur | 04:26.11 |
| 3 | Hoyvíkingur | 04:28.02 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Eysturoyingur | 27 |
| 2 | Vestmenningur | 25 |
| 3 | Hoyvíkingur | 20 |

# Beinta heldur tørn um oddasessin

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Beinta | 05:17.16 |
| 2 | Sílið | 05:19.05 |
| 3 | Falkur | 05:21.14 |
| 4 | Ørnin | 05:23.13 |
| 5 | Tjaldrið | 05:31.09 |
| 6 | Tambar | 05:32.24 |
| 7 | Silja | 05:40.04 |

**5-MANNAFØR GENTUR Hóast kappingin um FM heitið er ógvuliga tøtt, so var avrikið hjá gentunum úr Miðvági hesa ferð so mikið sannførandi, at tær mugu roknast at vera favorittar**

Tróndur Arge

Beinta úr Miðvági vann á Vágsfirði róðurin millum 5-mannaførini við gentum. Tað ber við sær, at kappingin er vorðin uppaftur tættari millum gentubátarnar. FM kandidatarnir eru tríggir: Beinta og Falkur hava 24 stig, og Sílið hevur 23 stig.

Róðurin var rættuliga skiftandi. Sílið fekk besta startin, men tað var skjótt, at Falkur legði seg á odda, og eina løtu var Sílið afturi á fjórða plássinum. Tá ið hálvt málið var rógvið, legði Beinta seg á odda, og genturnar úr Miðvági megnaðu at halda allar hinar aftanfyri seg.

Eftir Eystanstevnuna bendu úrslitini á, at Ørnin úr Sandavági hesa ferð kundi fara at blanda seg upp í oddastríðið, men soleiðis varð tað ikki, tí Sílið og Falkur høvdu betri endaspurt enn Ørnin.

Fjarstøðan frá Beintu og aftur til Sílið var hesa ferð knappliga tvey sekund. Á Eystanstevnu var fjarstøðan frá Beintu og aftur til Falkin, sum ta ferðina var næstfremstur, lítil og eingin. Ta ferðina var fjarstøðan frá vinnarabátinum, Beintu, og aftur til Sílið á fjórða plássi júst tann sama, sum hon var tað hesa ferð.

*trondur@sosialurin.fo*

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Beinta | 24 |
| 2 | Falkur | 24 |
| 3 | Sílið | 23 |
| 4 | Tjaldrið | 14 |
| 5 | Ørnin | 13 |
| 6 | Silja | 7 |
| 7 | Tambar | 5 |
| 8 | Fípan Fagra | 2 |